FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

Stjórnarskrivstovan
23. apríl 2021
Mál: 21/06677-2
(at tilskila í svari)

Svar til § 52 a fyrispurning nr. 52-116/2020 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmanni

Spurningar um staðseting av Veðurstovu Føroya:

1. Hvørji atlit eru tikin, tá ið avgjørt er at staðseta Veðurstovu Føroya í Tórshavn?
2. Er nøkur ætlan um at flyta veðurstovuna ella partar av henni út um landið - um ja, hvagar og nær?
3. Hevur samgongan eina ætlan viðvíkjandi miðspjaðing av almennum stovnum?

Svar:

Til nr. 1.
Málsøkið veðurtænasta varð yvirtikið í 2009, og tænastan er skipað undir Vørn. Rakstrarkonto á Løgtingsins fíggjarlóg er skipað undir Vørn. Tænastan hevur millum annað hesar uppgávur:

- Radiosonderingar tvær ferðir um samdøgrið
- Innlesing av veðurforsøgnum á telefonsvarara
- Umsiting av veðurstøðum á fleiri økjum kring Føroyar

Vørn umsitur útreiðslukontur til lønir, eins og keyp av vørum og tænastum.

Á vári 2021 hevur Vørn høli tøk, ið eru væl egnað til endamálið. Hølini eru umvæld seinru árini.

Við grundarlagi í hesum atlitum er støða tikin at leggja føroysku veðurtænastuna á Vørn í byrjanini.

Til nr. 2.
Ætlanin er at staðseta Veðurstovu Føroya á flogvøllinum í Vágum.

Eg skal í hesum sambandi leggja áherðslu á, at ætlanin er ikki, at flogvøllurin verður einasta staðið, ið nýtt verður í sambandi við veðurtænastu.

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Í hesum sambandi skal eg nevna, at vaktararbeiðspláss og líknandi kunnu staðsetast á øðrum plássum kring landið, tað veri seg í verandi hølum hjá Veðurstøðini í Tórshavn eins og í øðrum økjum kring landið.

Avgerð um eina spjadda staðseting skal sjálvandi grundast á tørv og onnur viðurskifti, ið serkunnleikin vísir á. Serkunnleikin í hesum føri eru veðurfrøðingar ella onnur, ið hava arbeitt við verkætlanini og/ella verða knýtt at tænastuni í framtíðini.

Til nr. 3.
Eg havi ikki luttikið í ítøkiligari viðgerð í samgonguni um ætlanir at miðspjaða almennar stovnar.

Eg kann tó viðmerkja, at ætlan mín í sambandi við veðurtænastuna er í góðum samsvari við hugsanir um spjaðing av virksemi kring landið.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður